# Eingin hjálp frá ALS? – viðmerking til kjakið um tørvin á arbeiðsfólki

ERNST JACOBSEN
stjóri á Arbeiðsloysisskipanini

**Tørvur á arbeiðsfólki**
Javnan berast tey tíðindi í fjølmiðlunum, at føroyskum arbeiðsgevarum tørvar arbeiðsmegi.

Arbeiðsgevarar, serliga við virksemi innan byggivinnuna og fiskivinnuna, bera fram, at vantandi arbeiðsfólk er orsøkin til, at framleiðslan er avmarkað í mun til, hvat hon kundi verið. Í sama viðfangi verður nortið við, at hóast arbeiðsmegin ikki røkkur, eru fólk, ið fáa arbeiðsloysisstuðul úr ALS, og at tað mangan er til fány tis at venda sær til arbeiðsávísingina hjá ALS eftir arbeiðsfólki.

Eitt feskt dømi um eina slíka framseting var at lesa í Sosialinum frá 18. januar 2007, har stjórin í Sandoy Seafood er endurgivin fyri at siga, at á Sandoy Seafood hava tey einaferð enn staðfest, at tey fáa ikki nógv burturúr at leita eftir fólki í ALS. Sama er støðan í Tavuni, har virkisleiðarin er endurgivin fyri at siga, at teir hava roynt at fáa fólk umvegis ALS, men at hetta hevur verið til fánýtis. Og í Sosialinum frá 9. januar 2007 er grein um trot á arbeiðsmegi í flakavinnuni. Í greinini verður staðfest, at uppgerðin um ta vantandi arbeiðsmegina stendur í skerandi andsøgn við upplýsingar, sum ALS hevur, og sum, sambært greinini í Sosialinum, vísa, at 105 fiskafólk ganga hendur í lumma.

Hesar framsetingar kunnu geva fólki ta fatan, at ALS ikki avgreiðir arbeiðstilboðini á nøktandi hátt, og hetta havi eg hug at gera nakrar viðmerkingar til.

**Arbeiðsfólk frá ALS**
Í 2006 avgreiddi ALS 330 arbeiðstilboð fyri arbeiðsgevarar. Talan var um bæði almennar og privatar arbeiðsgevarar kring alt landið, og um arbeiði bæði á sjógvi og á landi. Stórur partur av arbeiðstilboðunum vóru til fiskavirki og línubátar.

Tá ið ALS fær ein fyrispurning eftir fólki, senda vit so skjótt sum gjørligt eina røð av CV'um hjá fólki aftur til arbeiðsgevaran. Roynt verður at finna persónar, sum hava bústað, so at til ber at koma aftur og fram til arbeiðis sama dag. Tær stóru broytingarnar í undirstøðukervinum í Føroyum hava, sum vera man, stytt um tíðina at koma aftur og fram hjá einum stórum parti av Føroya fólki, og hesar broytingarnar hava eisini ávirkað, hvørji arbeiðstøk fólk verða vald til tey ymisku arbeiðstilboðini.

Okkara tummilsregla er, at arbeiðsgevarin fær 10 CV fyri hvørt arbeiðsfólk, ið tørvur er á. Tað vil siga, at um ein arbeiðsgevari ynskir 2 arbeiðsfólk, fær viðkomandi 20 CV sendandi at velja ímillum, um 20 fólk eru skrásett í skipanini við teimum røttu førleikunum og við bústaði í einum øki, so at til ber at koma til og frá arbeiði sama dag.

Tað er altíð avgerðin hjá arbeiðsgevaranum, hvørji av hesum fólkum hava rættar førleikar til arbeiðið, og hvørji hann ynskir at tosa nærri við. Um hann velur 5 av hesum 20 fólkunum, verður tað ein spurningur, um nakar av hesum 5 fólkunum velur at taka av arbeiðstilboðnum.

Hini 15 fólkini fáa ikki møguleikan at velja og verða verandi í skipanini.

Tá ið talan er um ávís arbeiðstilboð, millum annað á fiskavirki, tykist gongdin tey seinastu árini at hava verið, at stórir partar av teimum arbeiðstøku velja at siga nei takk. Hendan gongd tykist samsvara við høvuðsniðurstøðurnar í kanningini Arbeiðsmegi á føroysku flaka- og fiskavirkjum í framtíðini, sum granskararnir Dennis Holm og Bogi Mortensen hava latið úr hondum. Samanumtikið vísir tann kanningin, at nógv av teimum, sum arbeiða á flaka- og fiskavirkjum, ynskja annað arbeiði, og at børn teirra fáa annað arbeiði.

Tá ið talan er um arbeiðstilboð á øðrum økjum enn hesum, eisini fyri ófaklærd, gongur munandi betur at finna fólk til arbeiðsgevararnar.

**Haldgóða grund?**
Arbeiðstøk, sum fáa arbeiðsloysisstuðul, hava rætt til at siga nei takk til eitt arbeiðstilboð. Møguligar avleiðingar fyri arbeiðstøk av ikki at taka av einum arbeiðstilboði frá ALS eru, at tey fáa karantenu í 4 vikur, ella at tey verða koyrd úr skipanini, tí at tey ikki eru at meta sum arbeiðstøk. Hava tey haldgóða grund, fær tað ikki avleiðingar fyri útgjaldið, um tey ikki taka av einum arbeiðstilboði. Ein av teimum haldgóðu grundunum er ein læknaváttan.

**Lágt arbeiðsloysi**
Við ársbyrjan 2006 vóru umleið 1000 fólk skrásett at fáa útgjald frá Arbeiðsloysisskipanini.

Í løtuni eru um 500 fólk skrásett at fáa útgjald, og er hetta tað lægsta arbeiðsloysi hesa ársins tíð, síðani partarnir á arbeiðsmarknaðinum settu Arbeiðsloysisskipanina á stovn fyri skjótt 15 árum síðani.

Av hesum umleið 500 fólkunum eru umleið 100 fólk skrásett við arbeiðsroyndum innan fiskavirkisarbeiði. Hesi fólk eru búsett kring allar Føroyar.

**Nýggj ávísingarskipan og førleikamenning**
Hin 26. oktober í fjør fekk almenningurin loksins atgongd til www.starv.fo, arbeiðsávísingina á internetinum. Skipanin er ein liður í royndunum hjá ALS at betra um tænastustigið fyri bæði arbeiðsgevarar og arbeiðstakarar, og royndir higartil vísa, at undirtøkan fyri hesi skipan hevur verið góð.

Eisini hava vit tvey tey seinastu árini arbeitt miðvíst við at betra um útboðið av førleikamennandi skeiðum fyri arbeiðstøk. Hesi skeið eru ment við tí fyri eyga at betra um møguleikarnar hjá arbeiðstøkum at koma aftur til arbeiðis, og tørvurin á førleikum á arbeiðsmarknaðinum hevur stóran týdning, tá ið vit skipa fyri hesum førleikamennandi skeiðum. Leggjast skal afturat, at ein partur av, hvat slag av skeiðum ALS bjóðar teimum arbeiðstøku, er gjørd í samráð við vinnuna og fakfeløgini.

**Samanumtikið**
Samanumtikið kann sigast, at tað lága arbeiðsloysið, rætturin hjá arbeiðstøkum at siga nei til arbeiðstilboð, og talið av fólki, sum arbeiðsgevarar eru áhugaðir í at seta í arbeiði, hava ávirkan á úrslitið av einum arbeiðstilboði, sum ALS avgreiðir. Við amboðum sum starv.fo og førleikamenningini verða úrslitini av hesum arbeiðstilboðum frameftir støðugt betri.

# Nýtsla av heilivági

SIGVALD KRTISTIANSEN



Nú so nógv er umrøtt í fjølmiðlunum um heilivágsnýtslu í Klaksvík, og hvør orsøkin kann vera til hetta, kenni eg tað sum mína skyldu at koma við einari frágreiðing um ein part av hesari nýtslu. Tað snýr seg um B12 vitamin, sum má gevast sum innspræning við ávísum millumbilum fyri sjúkuna perniciøs anæmi. B12 verður kannað í blóðinum, og finst tað ov lágt, týðir tað upp á hesa sjúkuna, og so má B12 gevast regluliga sum innspræning. Hetta lægra markið er ásett av heilsustýrinum og er tað sama í øllum landinum.

Tað hava verið nógvir læknavikarar í Klaksvík seinastu nógvu árini, sum medisinius skrivar í lesarabrævi, tí læknatrot hevur verið, og har hava verið nógvir útlendingar. Ein svenskur lækni var har fyri nógvum árum síðani í fleiri styttri og longri tíðarskeið, navnaskeltið sást í fleiri ár uttan fyri læknahølið. Eg havi eisini verið læknavikarur har í fleiri umførum seinastu 10 árini, og eitt tað fyrsta, eg varnaðist, var at so nógvir sjúklingar fingu B12 vitamin sum innspræning, hóast perniciøs anæmi er rættiliga sjáldsom sjúka. Eg gjørdi vart við hetta yvir fyri teimum læknum og sjúkrasystrum, sum tá vóru har, og fekk at vita, at hesin svenski læknin, sum eg ongantíð hitti, hevði byrjað hesa viðgerð við tí grundgeving, at okkara mark fyri B12 í blóðinum var alt ov lágt, í Svøríki skuldi markið vera nógv hægri, og vandi fyri at fáa Parkinson sjúku ella onkra aðra neurologiska sjúku var stórur, um B12 var lágt í blóðinum. Tað er tí væl skiljandi, at sjúklingar, sum fáa slíkt at vita, vilja halda fram við at fáa hetta medisin, sjálvt um aðrir læknar siga tey ikki hava hesa sjáldsomu sjúku, og tí ikki hava fyri neyðuni at fáa B12 innspræningar. Tá einki hjáárin er, so ger tað einki, halda tey.

Tá annar svenskur lækni gjørdi vart við hetta í fjølmiðlunum í fjør, ringdi eg til hansara og greiddi frá, at viðvíkjandi B12 var tað hansara egni landsmaður, sum hevði sett hesa viðgerð í verk og grundgevingarnar fyri tí. Tað harmaði hann at so var, men helt, at har mátti onkur misskiljing vera, tí markið fyri B12 i blóðinum var á leið tað sama í Svøríki sum her. Tá Útvarp Føroya herfyri tók málið upp og tosaði við hendan svenska læknan um júst hetta, nevndi hann einki um teir upplýsingar, sum eg hevði givið honum, men vildi líkasum bara leggja ábyrgdina yvir á virkandi læknar í Klaksvík og landslæknan, sum hann hevði sent bræv um heiligvágsnýtsluna har. Frá- greiðingin um, hví hann fór avstað áðrenn ta ásettu tíðina, var eisini eitt sindur ullint.

Skála 20.01.07.

# Er fyri at hækka tímatalið hjá í fyrsta flokki



KÁRI P. HØJGAARD
løgtingsmaður

**Sjálvstýrisflokkurin stuðlar menningarætlan fólkaskúlans hjá landstýrismanninum í Mentamálum**

Sjálvstýrisflokkurin tekur sera positivt móti útsøgnunum frá Jógvan á Lakjuni, landstýrismanni um, at tímatalið hjá fyrsta og øðrum flokki verður hækkað við einum tíma yvir trý ár. Eftir hesi ætlan verður minstkravda tímatalið hjá fyrsta flokki økt úr núverandi 18 til 21, og fyri annan flokk úr 20 upp í 23 undirvísingartímar um vikuna í 2009.

Grannalond okkara hava hægri tímatal enn vit, og ynskiligt var sjálvsagt, at tímatalið fyri 1 flokk var 25 tímar ella meira. Tað er so alt tengt at játtan, (ætlaða økingin í tímatalinum kostar áleið 4 mió).

Tað er sera umráðandi at fáa fleiri føroyskt-tímar til fyrstu árgangirnar. Ein má jú duga sítt egna móðurmál væl og virðiliga, áðrenn farið verður undir at læra fremmandamál.

Vit hava ikki ráð at lata vera, tí byrjanin av skúlagongdini er avgerandi fyri úrslitið í seinra endanum.

Sjálvstýrisflokkurin hevur eisini í skrivligum fyrispurningi víst á trupuleikan við lesi og skriviveikum næmingum og manglandi hagtølum. Vónandi tekur landstýrismaðurin hendan bólk, ið eftir metan telur eini 10%, við í uppraðfestingina. Tað verður bíligari, um hesi børn kunnu fáa hjálp í byrjani, so tey kunnu fylgja við í undirvísingini. Truplari er at menna tey á eftirskúla, tí tey onki hava fingið við av vanligu undirvísingini.

Uppgávan at fáa fólkaskúlan so góðan og mennandi sum gjørligt, krevur átak frá okkum øllum. Lærarar og næmingar, hølisviðurskifti, undirvísingartilfar, uppgávan hjá heimunum og foreldrum, og síðst men ikki minst, politiski viljin til uppraðfesting.

Landstýrismaðurin hevur tikið fyrsta stigið. Taka vit øll lógvatak í felag kunna tungar byrðar lyftast, fólkaskúlanum at gagni.

Illur???
Sig tína meining í Sosialinum

